# Grannahús hjá Tróndi í Gøtu

**Vit fara í hesum parti at umrøða nøkur onnur av húsunum í grannalagnum hjá Tróndi í Gøtu. Hetta eru húsini í Mortanstovu, á Kletti og Tjørnustovu**



*Húsini í Mortanstovu*

**Mortanstova**

Í 1911 búðu í Mortanstovu Maren Fredrikka (1879-1957), gift við Zacharias Zachariassen (1854-1921). Hetta var onnur giftan hjá honum. Børnini vóru: Aksel, Anna Katrina, Jóhanna Malena, Jákup og Esbern.

Zacharias og Marin vóru kend sum eitt framúr álitisfólk, sum millum annað høvdu postin.

Hjá teimum var eisini hjartarúm sum hjá fáum. Hetta sæst ikki minst av fólkateljingi í 1911. Tá búðu Marin og Zacharias har saman við fýra børnum, tað yngsta Esbern var ikki føtt. Umframt búði inni Jógvan, sonur Zacharias í fyrru giftu. Jóhanna hjá Petur Jakku var genta í húsinum. Amaliel hjá Petur Jakku, beiggja Marin, búði har. Mamma hansara var deyð, og var hann tí komin til fastrina. Afturat hesum var Kristianna Justinussen úr grannahúsinum á Skipanesi inni har. Hon var evnaveik, og Marin hevði eisini hjarta fyri henni.

Elspa Sofía systir Amaliel var gift við Óla Jákup í Tjørnustovu í sama túni. Hon doyði í 1917 frá tveimum smáum synum. Tann yngsti Albert var nýføðingur, bert sjey vikur gamal. Hann fór tá at vera hjá abbasystrini Marin, og har fekk hann eisini eitt gott heim. Tískil kom Marin at taka hond um bæði son og abbason hjá beiggja sínum Petur Jakku.



*Zacharias og Marin í Mortanstovu saman við børninunum. Tann stóri drongurin er Aksel Leitisstein. Tann størra gentan er Anna Katrina, sum búði niðri. Tann minna er Johanna Malena, sum giftist við Sámal Petur í Køkinum. Minsta barnið er Jákup, pápi Zacharias, sum nú nú býr í Mortanstovu*

## Jólatræ í Mortanstovu

Jacobina Heinesen (1911-2005) var dóttir Jóan David, sum var beiggi Marin.

Ein systir Marin var Johanna, sum var gift niðri í Danmark. Tætt samband var millum Johannu og hennara ætt í Føroyum.

Jacobina hevur greitt frá søguni um fyrsta jólatræ í Norðragøtu, sum var í Mortanstovu í 1911.

Hesa søgu hevði Jacobina frá Gittu hjá Liða Dáva í Norðragøtu, sum giftist við Bernhard í Tjørnustovu. Gitta gloymdi ongantíð hetta fyrsta jólatræið hon sá. Johanna var komin upp at ferðast eini jól, og hon fekk gjørt eitt „kunstugt“ jólatræ. Tann, sum hjálpti henni við tí, var bróðursonurin Amaliel, Maljar. Eitt slíkt hevði eingin sæð áður, í hvussu er ikki har í bygdini. Johanna búði, meðan hon var í Føroyum, í Mortanstovu hjá systir síni. Har var stór roykstova, sum rúmaði nógvum fólki. Jólatræið varð tí sett upp í roykstovuni. Johanna hevði eisini við sær pappírsørk við kramarhúsum at klippa út. Kurvar og annað var eisini at pynta træið við. Tá alt var klárt, sendi Johanna onkran í húsini at bjóða øllum til jólatræ í Mortanstovu, og her var fult hús beinanvegin. Hetta var jú sera spennandi, tí eingin visti, hvat eitt jólatræ var.

Gitta var ongantíð í lívinum so ovfarin at koma inn í roykstovuna í Mortanstovu, sum tá hon kom inn og sá pyntaða jólatræið. Tað var ein velduga stór uppliving, sum leingi varð tosað um.

Mamma Jacobina, Anna Louisa, var dóttir Zacharias í Mortanstovu í fyrra hjúnarlag. Hon greiddi eisini frá sínum minnum um jólagávur, sum milt sagt vóru nógv øðrvísi enn í dag. Vanliga var jólagávan ein nýggjur kjóli. Toyið var vakurt, men oftast varð hann seymaður úr stóti, ið varð keyptur og litaður. So kjólarnir vóru vakrir, um teir ikki vóru, sum teir eru í dag. Jólaljós vórðu eisini keypt. Hesi vórðu snarað og høvdu ymiskar litir. Tey fingu eitt av hvørjum liti, og ljósini máttu setast í vindeygini um kvøldið at brenna. Tey vóru ikki minni fegin um hesar jólagávur, enn børn eru í dag fyri dungan, tey fáa í jólagávu.

Jákup, sonur Marin og Zacharias, giftist inn í Mortanstovu við Annilenu f. Tausen, ættað úr Runavík. Tey fingu eina harða lagnu, tá hugsað verður um, at fimm av teirra sjey børnum vóru deyv. Fýra av teimum máttu fara til Danmarkar at ganga í skúla, og var hetta sera hart, ikki minst hjá Annilenu, sum tó var eitt so serstakt tolið menniskja. Børnini komu øll væl fyri.

Í dag eru tað sonur Jákup, Zacharias, og kona hansara Lis, sum búgva í Mortanstovu. Hon er vist tann einasta av teimum gomlu ”stovunum” í gomlu Norðragøtu, har tað býr fólk fast.



*Anna Sofía á Kletti, sum fekk so syrgiligan deyða, tá hon var smittað av meslingum*

## Meslingar á Brúnni

Á Kletti, nærum áfast við Glyvra-Hanusarhús, búði í 1911 Joen Joensen Lervig. Afturat honum var sonurin Joen Fredrik við konuni Anna Sofía, sum var ættað úr Funningsfirði. Tá áttu tey eisini børnini Jógvan Martin, Høgna og Lisu.

Í 1916 var húsið á Brúnni karmur um eina hjartaskerandi søgu, sum fyrr er umrødd í FF-blaðnum. Søgan byrjar við, at Tummas í Funningsfirði kemur aftur av skipi. Meslingar gingu umborð. Tummas hevði tískil verið í karantenu teir 10-11 dagarnar, sum tað tekur smittuni at bróta út. Men tíðin var farin, og Tummas fór til hús. Á vegnum heim breyt hann kortini út við meslingum og doyði bert tveir dagar seinni.

Systir Tummas, Anna Sofía á Kletti, og svigarinna hansara, Anna Louisa í Jákupsstovu, sum var systir konu Tummas, Johonnu Sofíu, hildu, at tær skuldu fara norð at heilsa honum afturkomnan. Tær fóru so til gongu úr Norðagøtu norð í Funningsbotn, ein túrur sum mann hava tikið stóran part av einum degi. Tá ið tær komu inn sóu tær skilið, at Tummas hevði meslingar. Tær kúvendu aftur til Norðagøtu. Og tær máttu fara beinleiðus í karantenu, tí tær máttu fyri alt í verðini ikki koma til at smitta onnur, um illa vildi til.

Tær fóru báðar inn á Brúnna, grannahús hjá Tjørnustovu. Tær komu skjótt eftir, at tað var býtt, at tær vóru saman, um nú bert onnur var smittað. So Anna Louisa flutti út.

Og ólukkuligvís var Anna Sofía smittað. Hon varð sjúk og doyði í størsta einsemi. Hon kundi bert hava samband við tey fáu í bygdini sum høvdu havt meslingar frammanundan. Frá tí hon fór úr